# *Hent at vita í sambandi við andlát*

*Vegna umbygging er Kapellið ikki tøkt*

SJÚKRAHÚS
VERKIÐ

Við deyða og jarðarferð er nógv hjá teimum avvarðandi at taka støðu til. Hesin faldarin er ætlaður sum hjálp til avvarðandi, í mun til neyðugu fyrireikingarnar.
Eftir andlátið vinarliga setið tykkum í samband við Kapellið á tlf. **304580**
Uttanfyri vanliga arbeiðstíð ber til at ringja **304500**, lokal nr. **5888**.

## Prestar/Samkomuleiðarar

Avvarðandi mugu sjálvi avtala við prest/samkomuleiðara viðvíkjandi jarðarferð og kórseting, tá kistan kemur í kirkjuna/samkomuhúsið.

## Gravarar

Avvarðandi mugu boða gravaranum í viðkomandi øki frá skjótast til ber.

## Avvarðandistovan

Ynskja avvarðandi at síggja tann deyða, meðan líkið stendur undir børu, er neyðugt at avtala tíð við deildina, har andlátið varð (gerandisdagar frá kl 8 - 15).
Í Avvarðandistovuni er rúm fyri áleið 10-15 fólkum at savnast.

***Vegna umbygging á Landssjúkrahúsinum, ber ikki til at hava bønarhald í Kapellinum.***

Avvarðandi mugu at siga Kapellinum frá, nær tey ætla at kistan skal heintast, sí tlf-upplýsingar omanfyri. Kapellið skrásetir síðani heintanina. Støða má takast til um kistulokið skal verða av ella á.

## Heintan av kistu

Í samband við fráferð, har avvarðandi koma, mugu tey venda sær til Leiðbeining fyri at verða fylgd niður í Avvarðandistovuna.
Um kistulokið skal verða av, leggja avvarðandi sjálvi lokið á kistuna.
Ikki er neyðugt við berarum til fráferðina.

## Kista og líkklæði

Tey avvarðandi mugu sjálvi bíleggja kistu og líkklæði so skjótt til ber.
Sí yvirlit við kistuveitarum (sí *www.ls.fo/andlat).*
Tað ber eisini til at verða klæddur í egin klæðir. Tá er neyðugt at koma við klæðunum til Leiðbeiningina, so skjótt sum til ber (Merk posan við navni og føðingardegi).

## Lýsing um andlát

Kringvarp Føroya hevur tel. 347500 og teldupost andlat@kvf.fo.

## Líkbilur

Avvarðandi avtala flutning við líkvogni við at seta seg í samband við føraran av líkvogninum hjá avvarðandi kommunu.
Flutningur við kommunala líkvogninum er ókeypis.

## Blómuprýði

Um kistan skal prýðast við blómum, kann hetta bíleggjast frá einum av blómuhandlunum. Tey syrgja fyri, at blómurnar koma út á Landssjúkrahúsið. Avvarðandi leggja sjálvi børuprýðið á kistulokið.

## Fráboðan

Landssjúkrahúsið boðar myndugleikum og Skiftirættinum frá andlátinum.
Í samband við andlát verða klæðir latin teimum avvarðandi. Allir virðislutir verða latnir Skiftirættinum, soleiðis at teir gerast partur av deyðsbúgvinum.

## Stuðul

Heilsutrygd veitir stuðul til gravarhjálp smb. umsókn, tó í mesta lagi 5.000 kr.
Sí www.heilsutrygd.fo

*Les annars ofta settar spurningar á heimasíðu okkara www.ls.fo/andlat.*

*Við samkenslu*

Dagført mars 2024 —Uttanlandstænastan